# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## TOPPDYSTUR HJÁ KVINNUM

Sunnudagin møtast tey bæði sterkastu liðini í kvinnukappingini í fótbólti. Higartil hava hvørki KÍ, sum eru meistarar, ella AB, sum eru avbjóðarar, tapt nakran dyst, og liðini liggja 9 stig framman fyri tey næstu í røðini. KÍ og AB hava spælt einaferð ímóti hvørjum øðrum, og tá endaði tað við javnleiki á Argjum. Nú hittast liðini til nýggjan toppdyst, og hesaferð verður spælt í Klaksvík.

**KÍ-AB**
Kvinnufótbóltur
Sunnudagin 22/5 kl. 13.00



## EDITH MØRKØRE FRAMSÝNING Í RUNAVÍK

Dýra biðidag kl 14.00 verða dyrnar latnar upp fyri listaframsýning við Edith Mørkøre í Gallarí Elisabeth í Runavík.
Gallarí Elisabeth er nýggja gallaríið á Heiðavegi. Framsýningin er opin fríggjdagin, leygardagin og sunnudagin.

**EDITH MØRKØRE**
Framsýning í Gallarí Elisabeth
Fríggjdagin 20/5-Sunnudagin 22/5



## JACK SPARROW GER AFTUR UM SEG

Fjórði filmurin í røðini um Pirates of the Carribean kann í hesum døgum upplivast í biografum kring heimin. Søgan um Jack Sparrow og hansara ævintýr er hugtakandi og populer, og filmsrøðin heldur fram við nýggjum hendingum. Filmurin bjóðar action, ævintýr, undirhald og skemt.

**PIRATES OF THE CARRIBEAN: ON STRANGER TIDES**
Biograffilmur
Hósdagin 19/5-



## FM Í SVIMJING

Komandi dagarnar fara bestu svimjararnir í landinum at kappast um føroyameistaraheitini í teimum ymsu greinunum og teinunum. Sjónvarpið hjá Kringvarpinum fer at senda frá finalunum fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin, so tá verða landsins bestu svimjarar veruliga í andgletti.

**FM Í SVIMJING**
SvF 20/5, 21/5 og 22/5



## BÁTASTEVNA Í VESTMANNA

Hetta vikuskiftið hava tey bátastevnu í Vestmanna. Tað er 10. árið á rað, at bátastevna er har, og undanfarin ár hevur tiltakið riggað óføra væl. Nógvir bátar, húsvognar og nógv fólk luttaka á stevnuni, sum bjóðar fjølbroytt undirhald. Tað ber til at uppliva barnaundirhald, dans, ATV koyring í fjøllunum, sølubúðir og mangt annað. Meira kann lesast um tiltakið á vif.fo.

**BÁTASTEVNA Í VESTMANNA**
Fríggjadagin 20/5 og leygardagin 21/5



## BYGDASTEVNA Í HVALBA

Hetta vikuskiftið hava tey bygdastevnu í Hvalba, og har hava tey mangt og hvat á skránni. Burtur úr skránni kann nevnast fótbóltur, felagssangur, útferð í Lítla Dímun, matsølur, hoppiborgir, kalt borð, dansur og annað.

**BYGDASTEVNA Í HVALBA**
Fríggjadagin 20/5 og leygardagin 21/5